# Viðmerking til lesarabræv hjá Egini Markná

TINA K. JAKOBSEN



Í 1948 varð Forbundet af 1948 stovnað. Hetta er forleyparin til felagið Landsforeningen for bøsser og lesbiske, vanliga stytt LBL. "Forbundet af 1948" virkaði fyri borgararættindum til homoseksuell.

Tvey onnur feløg vóru eisini til, Lesbisk bevægelse og Bøsserens Befrielsesfront.

Bøssernes Befrielsesfront varð stovnað í 1971, og endamálið var at upplýsa um homoseksuell í Danmark. Eisini var endamálið at ávirka politiskt og stríðast ímóti tí vanliga kynsrollumynstrinum.

Lesbisk bevægelse varð stovnað í 1974 og hevði til endamáls at sláa fast rættin hjá kvinnum at liva uttan menn.

Tá Egin Markná sigur: "Minnist til, næstu ferð hóttanirnar koma, at tað er ikki so langtsíðani at felagsskapurin at: "Landsforeningen for Bøsser, Lesbiske og pædofile", (…)", so haldi eg, at tað er upp á sítt pláss, at hann kann koma við keldu fyri hesum. Tí hetta er lygn.

Pædofil í Danmark hava havt, og hava møguliga enn, ein felagsskap. Hesin felagsskapur hevur ongantíð verið partur av LBL, og LBL hevur ongantíð samstarvað við henda felagsskap á nakran hátt. Tað finnast uttan iva samkynd, ið eru pædofil, eins og tað finnast pædofil, ið ikki eru samkynd, men tað merkir ikki, at feløgini eru tengd at hvørjum øðrum. Pædofil eru uttan iva at finna bæði í feløgum fyri samkynd, fyri frímerkjasamlarar, fyri fuglaáhugað, á kristiligum samkomum og manga aðra staðni.

Egin Markná er tískil heilt burturvið í sínum lesarabrævi. Egin má fegin halda tað vera propaganda, tá samkynd royna at upplýsa føroyingar um homoseksuell, men er tað at upplýsa um ein seksualitet at føra propaganda? Og hvar kemur hesin propagandatankin frá? Til dømis hevur Friðarbogin ongantíð havt eina lýsingaherferð, har tey mæla fólki til at gerast homoseksuell, um tey ikki eru tað frammanundan. Tað, sum felagið hevur arbeitt fyri, er at gera tað liviligari fyri føroysk samkynd, soleiðis at tey tora at spretta og liva sum samkyndir føroyingar í Føroyum.

Og til spurningin um, hví vit ikki kunnu hava okkara seksualitet innanveggja – Flestu føroysku samkynd hava teirra seksualitet innanveggja! Hvussu nógvar dreingir sært tú leiða hvønn annan ella mussa hvønn annan á gøtunum í Føroyum?

Eg havi ikki sæð hetta í Føroyum enn!

Og um tað skuldi hent seg, at tú sást hetta, í morgin sum ein annan dag, hvat missur tú við hesum?

Vit blanda samfelagið upp í hetta, tí vit liva í hesum samfelagnum, eins og tú, og vit hava rætt at krevja broytingar, soleiðis at tað gerst liviligari.

At enda vil eg bara siga, at ongin orsøk er hjá tær og tínum at óttast. Broytingar eru nú gjørdar í lógini, so at sigast má, at tað er gingið nógv aftur á hond, síðan §266b við tógvið stríð varð samtykt. Felagið Friðarbogin er ikki eitt aktivt felag longur, og flestu samkynd eru flutt av landinum, ikki er løgið, at Føroyar í Politiken herfyri verða skírdar sum u-land; nú manglar næstan bara, at vit fara at hongja samkynd í gøtunum til skrekk og advarsel.

Lívdin - í lívd hins hægsta

Betongarbeiði til samkomubygning

Í sambandi við bygging av nýggjum samkomubygningi til Lívdina í Hoyvík verður við hesum boðið til undangóðkenning av arbeiðstakarum at geva tilboð uppá betongarbeiðstøkuna.

**Arbeiðstøkan:**
Betongarbeiðstøkan fevnir um fundament, lendisgólv og staðstoyptar veggir. Harafturat verða skilagólv og takdekk gjørd av staðstoyptum betongi, tó í støðum av betongelementum. Tekjan yvir salin verður gjørd av TT-takelementum við vafluplátum í millum. TT-elementini spenna umleið 29 metrar.

**Mettar høvuðsnøgdir:**
- Staðstoyptir betongveggir og fundamentir: ...... 600 rúmmetrar
- Staðstoypt lendisgólv: ........................................ 1600 fermetrar
- Staðstoypt dekk og tak: .................................... 1460 fermetrar
- Forspennt holdekkelementir: ............................ 580 fermetrar
- TT-elementir við vafluplátum: ............................ 700 fermetrar

**Treytir:**
Áhugaðir arbeiðstakarar fáa meira at vita um kravdar uplýsingar, treytir o.a. á heimasíðuna hjá Lívdini (www.livdin.fo). Fylg leinkjuni "Undangóðkenning av arbeiðstakarum at geva tilboð uppá betongarbeiðstøkuna"

**Freist**
Áheitan um undangóðkenning skal sendast til Selmar Nielsen Arkitektur Spf, Landavegi 9, Tórshavn, í seinasta lagi mikudagin 10. juni. Eru spurningar, ber til at ringja til Jóhan Syderbø, prosjekteringsleiðara á tlf. 354812 ella 210818.

Selmar Nielsen Arkitektur Sp/f

LBF Ráðgevandi verkfrøðingar

Pf. Sofus M. Jakobsen Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.

STEINGRUND AKUSTIK RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGUR

SP/F KJ ELRÁÐ RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR

# Hví er so langt úr Havn og út á Strendur ella til Klaksvíkar?

JOHN WILLIAM JOENSEN
Norðoya Sambandsfelag



**Tað ørkymlar ikki sørt, at tað stuttu tíð, sum m. a. Helgi Abrahamsen hevur sitið í løgtinginum, hava borgarar í Eysturoynni, Vágum og Norðoyggum mist týðandi part av kommunulæknatænastuni. Kæri Helgi.**

Eg kann taka undir við tær at ymiskt er, hvussu fólk uppfatað tað, sum skrivað verður, og tá eg læs grein tína, fór eg at ivast í, um tú gekk ørindi fyri onkran – tí tað kann ikki verða so galið, at ein løgtingslimur kennir so lítið til tær broytingar, sum henda - eitt nú innan læknavaktina og tilbúgvingina í m.a. Eysturoynni og Norðoyggum.

Tú skrivar, at lokala stríðið má enda og vísir til tað, sum Norðlýsið hevur víst á nú tænastan til borgarar í norðoyggjum og eysturoynni viðvíkjandi kommunulækna og tilbúgving/politi verður skerd.

Tað ørkymlar ikki sørt, at ta stuttu tíð, sum tú hevur sitið í løgtingum, hava borgarar í Eysturoynni, Vágunum og Norðoyggum mist týðandi part av kommunulækna-tænastuni.

Spola vit tíðina aftur eini fimm, seks ár so høvdu vit "fyri borgaran" eina sera góða tænastu sum kallaðist Kommunlæknaskipanin.

Sum dømi kann eg nevna, at um sonur mín (í Klaksvík) ella eitt av børnum tínum (á Strondum) gjørdust sjúk eftir kl. 16 yrkadagar, ja so ringdi tú til vakthavandi kommunulækna og løtu seinri kom læknin inn til okkara - heima við hús. Fyri fáum árum síðan gjørdist omma mín bráðliga sjúk um miðnáttarleitið á páskum - meðan vit vóru stødd í summarhúsum á Selatræ. Tað gekk ein góð løta, so kom kommunulæknin inn í stovu okkara, og omma fekk viðgerð. Hann greiddi frá, at hann hesa somu nátt hevði verið m.a. í Leynum og á Eiði - hann var móður – men hevði tjent góðar pengar – og tað var honum væl unnt.

Á tíni vakt sum løgtingslimur hava vit mist hesa tænastuna, og nú mugu vágafólk, eysturoyingar, streymoyingar og norðoyingar á nátt, summi ella vetri, sjálvi útvega sær bil og flutning og síðani koyra til Havnar. Í Havn er tænastan munandi batnað. Tey kunnu alt samdøgrið spasera inn til vakthavandi kommunulækna og hava kanska ikki eingang tørv á bili.

Samstundis hevur útreiðslustøðið hjá sjúkra-, lands-, og kommunukassunum til kommunulæknatænastuna ongantíð áður verið størri. Men ein kann sjálvandi fegnast um at arbeiðsbyrðan hjá Andreas Petersen, Jaspur Petersen, Marius Dam, Jenisi & Co. er munandi minkað. Kanska júst tí varð neyðugt so seint sum í oktobermánaði í fjør at geva kommunulæknunum eina lønarhækking uppá 17% av grundlønini.

Sjúkrakassin betalir millum 50 og 60 milliónir krónir um árið til kommunulæknarnar í tænastugjøldum og øðrum – samstundis sum kommunurnar gjalda útreiðslur - sum hølir, klæðir, amboð o. a.t. og tað fegnast vit sjálvandi um - tí øll vilja hava eitt "vælvirkandi" heilsuverk.

Meðan tú Helgi hevur sitið á vakt í løgtinginum hevur Hans Pauli verið so óførur at sama dag sum hann gav kommunulæknunum gyltu hondina - setti hann ein bólk at gerða eina heilt nýggja skipan á kommunulæknaøkinum – í bólkinum sitað fýra kommunulæknar og fýra embætisfólk. Tann skipanini fer neyvan at seta størri krøv til tænastuna enn verðandi skipan tá eingin er í bólkinum, sum umboðar brúkaran – og læknarnir vita jú betri enn vit "deyðiligu" hvat tað er sum brúkarin hevur brúk fyri?? – Livst so spyrst!!

Helgi Abrahamsen skrivar: "*Vit brúka tonsavís av brennievni at flyta okkum aftur og fram eftir longum vegastrekkjum tí vit hava eitt bústaðarmynstur sum ikki hóskar seg til nútíðarsamfelagið......*"

Eg má spyrja teg, Helgi - er nøkur sparing í brennievni (í hesum CO2 tíðum) at allir norðoyingar og eysturoyingar, streymoyingar og vágamenn – skulu koyra til Havnar – ístaðin fyri at kommunlæknar kring landið - sum enntá fáa løn fyri at sova við eini bakvakt-telefon á náttborðinumverða vaktir og koyra til sjúklingin fyri somu løn, sum teir í dag sova fyri?? – Kanska tú Helgi veist at svara hesum?? Eg havi roynt at spurgt á rætta stað - men eingin vildi svara hesum.

Helgi Abrahamsen skrivar: "*....Eg mæli ikki til at reka fólk úr bygdum, men eg kenni meg sannførdan um, at vit megna ikki at veita teimum tær tænastur, sum vit nútíðarmenniskja krevur....*"

Nú mást tú endiliga ikki halda at tú hevur uppfunnið hetta við at tað er bíligast um øll búgva í meginøkinum. Hetta er eitt hugtak sum lokalpolitikarar í meginøkinum hava tosað um í umleið eina øld, og tú ert skjótur at taka við læru!

Men eingin av hesum lokalpolitikarum duga at svara, hví tað er so ótrúliga langt úr miðøkinum út til økini, sum liggja í føroyska útjaðaranum. Orsøkin kann ikki verða landafrøðilig, tí vit búgva í einum av heimsins minstu londum, men heldur tann nalvaskoðan sum vit hvønn dag síggja og hoyra frá politikarum úr miðøkinum.

Annars takk fyri at tú tímur at skriva um evnið – sum eingin í løgtinginum longur sýnir áhuga fyri!